

# ROKNSKAPARLEIÐARI

*Hevur tú ein brennandi áhuga fyri roknskapi og vilt hava ein fjølbroyttan gerandisdag?*

Atlantic Partner A/S í Rødovre søkir eftir roknskaparleiðara til eitt nýstovnað starv. Tú skalt duga at uppbyggja eina roknskapardeild og sjálvstøðugt standa fyri arbeiðsgongdunum á deildini.

**Tínar uppgávur verða fyrst og fremst:**

- Bóking, bókhald, lønarroknskap og fíggjarstýring
- Hagtøl
- At arbeiða við tollavgreiðslu.
- Aðrar fyrifallandi uppgávur á arbeiðsplássinum

**Tínir førleikar:**

- HD prógv í roknskapi ella líknandi útbúgving
- Royndir við roknskapi
- Kunnleika til Concord C5
- Ert lagalig/ur og dugir at veita góða tænastu
- Ert ábyrgdarfull/ur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur lætt lyndi og dugir at skemta

**Um teg:**
Tú fert at arbeiða í eini fyritøku í stórari menning og samstarva við dugnaligar og beinasamar starvsfelagar. Best er, um tú hevur møguleika at byrja beinanvegin, men skalt tú fyrst greiða viðurskiftini á tínum verandi arbeiðsplássi, bíða vit gjarna eftir tær, um tú ert júst tann rætti fyri okkum.

Atlantic Partner A/S varð stovnað í 1991. Vit eru eitt landsumfatandi handilsvirki, sum fyrst og fremst virkar á danska marknaðinum, men sum hevur serkunnleika í samhandli við føroyska og íslendska marknaðin.

Hevur tú spurningar til starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Kurt Jensen ella Geert Jørgensen á tel +45 39 27 40 50, teldupost: gj@atlantic-partner.dk. Tú kanst eisini tosa við Poul Michelsen á tel 31 46 50, teldupost poul@pm.fo.
Atlantic Partner A/S, Krondalvej 10, 2610 Rødovre, www.atlantic-partner.dk
(eitt systurfelag hjá P/F Poul Michelsen)

ATLANTIC PARTNER A/S

Atlantic Partner A/S - Krondalvej 10
2610 Rødovre - www.atlantic-partner.dk



# Goymslu- og handils-lærlingur á Skipasmiðjuni

Hevur tú hug at koma í goymslu- og handilslæru á Tórshavnar Skipasmiðju?

Vit ynskja, at tú hevur miðnáms-útbúgving og at tú:

- Ert opin og hevur lætt við at samskifta
- Hevur góðan teldu- og talførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

Harumframt er tað neyðugt, at tú hevur áhuga fyri mekaniskum og el-lutum.

Í lærutíðini fert tú at starvast á teimum ymisku goymslunum hjá fyritøkuni.

Góður møguleiki er fyri føstum starvi eftir loknað útbúgving.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att.: Mouritz Mohr

í seinasta lagi 3. sept. 2007.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, kanst tú venda tær til Boga Kirke á telefon 30 11 11 ella 50 11 11 ella við telduposti til bogi.kirke@faroeyard.fo.

SKIPASMIÐJAN

Tórshavnar Skipasmiðja
J.C. Svabosgøta 31
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

## At bera fram tekst, talu ella sjónarmið

Sjónleikarhúsið í Tórshavn bjóðar áhugaðum á skeið

Leygardagin **15. september 2007 ella 22. september 2007** frá kl. 08:30 til 15:30 verður arbeitt í Sjónleikarhúsinum við upplestri, framløgu, uppliving, upptøku og eftirmeting.

Skeiðið vendir sær til tey, sum ynskja:
· at arbeiða við upplestri
· at gerast sjónlig/ koma í reyða stólin
· at royna upptøku í ljóðstudio
· at eftirmeta upptøku
· at brúka ein dag til raddarvenjing, lurtiroyndir og refleksión

Ábyrgdina av skeiðnum hava:
*Gulla Øregaard, idéfólk og fyrilestrarhaldari*
*Jón McBirnie, ljóðserfrøðingur*
*Jytte Joensen, sjónleikari og raddarvenjari*
*Oddvá Nattestad, samskipari*

Tilmeldingin verður gjørd við telduposti **oddva@email.fo** ella **telefon 311132** innan 5. sept. 2007.

Prísurin er 2.000 kr. fyri hvønn luttakara.
Serlig matarskrá er íroknað.

**Havnar Sjónleikarfelag**
**Sí heimasíðu www.hsjonleik.fo**

TEAM85

Sosialurin
Sosialurin
i